## Kunngerð um tiltøk at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangsvirksemi

Danska Økonomi- og Erhvervsministeriet hevur sett í gildi kunngerð um tiltøk at fyribyrgja hvítvaski og fígging av yvirgangsvirksemi.

Suðuroyar Sparikassi vísir til hesa kunngerð og ger vart við, at tá tú gerst kundi í Suðuroyar Sparikassa, skal tú fylla út eitt spurnarblað (sí pkt. 1 í vanligu viðskiftatreytunum).

Í sambandi við allar flytingar yvir kr. 99.999, skal tú framyvir geva Suðuroyar Sparikassa eina frágreiðing, har upplýst verður, hví tú flytur peningin, til hvønn tú flytur peningin, og hvat peningurin skal nýtast til.

Orsøkin til hesa frágreiðing er, at Suðuroyar Sparikassi skal kunna skjalprógva fyri myndugleikunum, at eingin kundi í Suðuroyar Sparikassa er fevndur av hvítvaski ella fíggjar yvirgangsvirksemi.

Henda mannagongd er eins fyri allar fíggjarstovnarnar í Føroyum.